# Vælferð ístaðin fyri undirsjóvartunnil



Val
ANNIKA OLSEN
Valevni Fólkafloksins

Hugflogið er ikki serliga høgt hjá sitandi samgongu og raðfestingarnar hjá politikarunum eru út av lagi vánaligar. Tað sær út til, at tað er eitt, ið melur í høvdinum á politikarunum at bora hol, ið alt tað, sum til ber at bora í.

Sagt verður, at tað er umráðandi at halda virkseminum í landinum í gongd, men er tað ikki nógvar aðrar íløgur, ið hava ligið á láni leingi, sum eisini hevði kunnað hildið virkseminum í landinum uppi?

Vit fáa ikki nakað vælferðarsamfelag við bara at hugsa um samferðslukervið, vegasambandið o.s.fr. Tað sær út til, at øll hol og allir vegir skulu gerast, áðrenn vit yvirhøvur kunnu gera okkum tankar um nakað annað. Vit eru øll samd um, at samferðslukervið áhaldandi má mennast, og at tunnlar skulu gerast, men er tíðin ikki komin til at hugsa um onnur mál, ið hava við vælferðina hjá føroyingum at gera? Um vit vilja, at tað skulu búgva 70.000 føroyingar í Føroyum er tað ikki gott nokk bara at hugsa um samferðslukervið. Nýmótans føroyingurin setur nógv størri krøv enn bara góðir vegir, tunnlar og skip. Nýmótans føroyingurin vil eitt nú hava góðar og tryggar karmar til sína familju, ein góðan fólkaskúla við høgari góðsku, ein miðnámsskúla, har karmarnir eru í lagi, eitt ríkt mentanarlív, trygg og góð viðurskifti til tey veiku og rørslutarnaðu, góðar umstøður til tey sálarsjúku og eg kundi hildið áfram.

Ein av orsøkunum til, at føroyingar uttanlands ikki velja at flyta heim aftur til Føroyar er, at teir hava vant seg við eina vælfungerandi vælferðarskipan, sum teir ikki síggja aftur í Føroyum. Vit kunnu taka familjuviðurskiftini sum eitt dømi. Danski barnastuðulin er 3300 kr kvartalið netto, danir hava bústaðarstuðul, sum er ein góð hjálp til eitt nú láglønt og støk við børnum, danir hava eitt ára barnsburðarfarloyvi og ikki minst eitt lágt kostnaðarstøði samanborið við tað føroyska. Hesi vælferðartilboð, ella vit kunnu siga minstamark fyri, at nógv kunnu yvirliva gerandisdagin er ikki rúm fyri við einari so risastórari íløguætlan sum undirsjóvartunnilin til Sandoynna vil viðføra. Eg haldi sjálvsagt, at Sandoyggin og Suðuroyggin eisini skulu tengjast at meginøkinum javnsett við hinar oyggjarnar, men tíðin er ikki tann rætta. Harumframt haldi eg tað vera gott gjørt av politikarunum, ið sita við valdið at fyrst brúka 1 milliard til suðuroyarleiðina, her hugsi eg um Gomlurætt, Teistan, Smyril og Krambatanga og síðani gera ein undirsjóvartunnil beint aftaná til 700 mio. krónur, tað er at gera gjøldur við fólki.

**Vælferðarmálaráð**

Ístaðin fyri bert at hugsa um hol, kundi vit roynt at fylt hini holini, ið ikki at eiga at vera í okkara samfelag. Eftir mínum tykki kundi Fiskimálaráðið og Vinnumálaráðið verið lagt saman í eitt aðalráð, hetta hevði givið rúm fyri einum aðalráði, ið arbeiddi við vælferð burturav. Eitt tílíkt vælferðarmálaráð, kundi eitt nú fevnt um familjupolitikk yvirhøvur, barsilsskipan, barna og ungdómspoltikk, ið vit í grundini yvirhøvur ikki hava, eldrapolitikk, viðurskifti hjá rørslutarnaðum, sálarsjúkum, mentan og javnstøðumál. Alt tað, sum hevur við vælferð at gera, liggur spjatt kring øll aðalráðini, og tískil síggja vit ongan yvirskipaðan vælferðarpolitikk í Føroyum. Eitt vælferðarmálaráð hevði sostatt eisini givið hinum aðalráðunum størri rásarrúm, av tí at nøkur av teirra málsøkjum vildu verðið flutt til vælferðarmálaráðið. Vit mugu leggja á annan bógv og gera lívið lagað hjá øllum at liva í í Føroyum, bæði illa støddu barnafamiljuni, hjá teimum støku við børnum, teimum sálarsjúku, teimum rørslutarnaðu, teimum eldru, teimum ungu, ið alsamt seta størri krøv til útbúgving og karmar til teirra virksemi og ikki minst eigur tónleika og mentanarøkið at fáa nógv størri játtan fyri alsamt at menna sítt virksemi. Stundin er komin, at vit mugu síggja skriftina á vegginum – vit søkka afturúr, um vit ikki seta ferð á okkara vælferðarpolitikk.

# Um at koyra við spitaranum í botni og fótinum á bremsuni



Val
HELENA DAM Á NEYSTABØ

Tað eru tvey stór mál til viðgerðar í samfelagnum í løtuni. Tey mugu loysast sum tvær síður av somu søk, tí tey hanga óloysiliga saman.

Annað stórmálið snýr seg um at búskapurin er ov heitur.

Hitt stórmálið er, at okkum vantar arbeiðsmegi.

Avleiðingarnar av ovurhitaðum búskapi kenna vit tíverri alt ov væl. Okkum nýtist bert at minnast aftur á 1992, tá ið Føroyar fóru av knóranum. At Føroyar fóru á húsagang í 1992 var ein beinleiðis avleiðing av, at búskapurin í alt ov langa tíð hevði verið ov heitur. So ring er støðan ikki í dag, men tað fer at ganga út yvir nógv fólk, um vit einki gera við hesi bæði stóru mál. Tí tað er ein sannroynd, at í einum upphitaðum búskapi veksur gjógvin millum rík og fátøk.

Ein onnur avleiðing av ovurhitaðum búskapi er, at vinnuni eins og tí almenna tørvar arbeiðsmegi. Tað eru ov fá fólk, ov fáar hendur og ov fá høvd til at loysa allar tær uppgávur, sum leika á í senn í tí heita búskapinum. Øll hjól – bæði almenn og privat - mala við fullari ferð, og tað skal ikki nógv til, áðrenn ketan leypur av. Tað er tí alneyðugt at køla búskapin niður, um man ikki velur at loysa hin trupulleikan, nevniliga at økja um arbeiðsmegina við t.d. at lata upp fyri útlendskari arbeiðsmegi.

Tá ið man hvørki kølir búskapin niður, og heldur ikki setur tiltøk í verk til tess at økja um arbeiðsmegina, tá kann man siga, at man koyrir við spitaranum í botni, samstundis sum hin fóturin stendur á bremsuni. Ger man tað leingi, er einki at ivast í at bilurin brennur saman.

Sjálvandi eiga vit at taka øll neyðug fyrivarni, tá ið tað snýr seg um at lata tann føroyska arbeiðsmarknaðin upp fyri útlendskari arbeiðsmegi. Hin vegin má man tálma búskaparvøkstrinum, so leingi sum tørvur er á arbeiðsmegi.

Hyggja vit at øllum teimum íløgunum, sum landið og føroysku kommunurnar standa fyri, so stendur rimmarfast, at tað almenna ber alt ov nógv brenni til tann heita búskapin.

Tað hevur altíð verið góður javnaðarpolitikkur, at føra konjunkturtálmandi fíggjar- og búskaparpolitikk. Tá ið lítil ferð er á búskapinum, setur man neyðugar íløgur í gongd, og tá ið nógv ferð er á búskapinum, tekur man ferðina av við at tálma tær almennu íløgurnar. Gera vit tað, so verða bæði skúlar, stovnar og tunnlar bygdir í øllum góðum - og í rættari raðfylgju.

Skulu vit framtíðartryggja føroyska búskapin, og sostatt eisini góð livilíkindi fyri okkara eftirkomarum, er neyðugt at finna aftur á hesa slóðina.

# Bókasøvnini og Pisa

MORTAN HENTZE

Í samband við pisakanningina eru tað fólk sum siga, at vit mugu styrkja skúlabókasøvnini, so lesiførleikin hjá børnunum kann betrast.

Eg haldi ikki, at tað, at styrkja skúlabókasavnsøkið fer at loysa nakran lesitrupulleika. Skúlabókasøvnini eru fyrst og fremst eitt amboð, sum børnini eiga at brúka í samband við teirra virki innan skúlagátt, og skúlabókasøvnini eiga sjálvandi verða útstýrd til hetta endamálið.

Um ein ynskir at taka hond um lesitrupulleikan, so eiga bæði land og kommunur heldur at bera so í bandi, at vit fáa nøkur dygdargóð fólkabókasøvn kring landið. Dygdargóð fólkabókasøvn, sum standa opin hvønn dag, allan dagin, eisini aftaná skúlatíð. Dygdargóð bókasøvn, har børnini og tey vaksnu saman ella hvør sær finna frítíðarlestnað, og heinta sær vitan og upplivilsi gjøgnum teir mongu miðlanar og møguleikarnar, sum bókasøvnini eiga at bjóða almenninginum.

Tað er ein stórur trupulleiki, at vit ikki hava eitt einasta fólkabókasavn í landinum, sum stendur mát við nútíðar bókasøvn í okkara grannalondum. Her hugsi eg m. a. um fysiskar og tøkniligar karmar, um upplatingartíðir, og ikki minst um breidd í tilfari og tilboðum.

Bókasavnsøkið hjá okkum er á steinaldarstøði. Haldi at tað er heilt burturvið, at tey fáu oyruni, sum verða brúkt á bókasavnsøkinum í stóran mun fara í nøkur smá skúlabókasøvn, sum standa stongd tað mesta av degnum í onkurm avlopskróki í skúlunum. Haldi at hetta er fullkomiliga meiningsleyst.

Foreldur sum lesa, eiga børn sum lesa, siga fleiri kanningar. Og eitt er so heilt vist, og tað er, at vit fáa ikki fleiri foreldur og børn sum lesa, við at leggja orkuna í at styrkja smáu skúlabókasøvnini. Vit eiga heldur at byggja og reka nøkur fá, men tíðarhóskandi og dygdargóð fólkabókasøvn.

Fann hetta í pisafrágreiðingini:

"Ved afslutningen af PISA-Færøerne 2005 blev der fremsat følgende mulige forklaringer på de relativt dårlige resultater:

De relativt små lokalsamfund betyder, at de offentlige biblioteker råder over beskedne samlinger, der ikke er udfordrende eller attraktive for unge mennesker".

# Kommunan, vit og umhvørvi

JÓGVAN ELIS DANIELSEN
Hvalba

Í hesum tíðum verður tosað og skrivað nógv um umhvørvi. Tíbetur verður eisini gjørt nógv fyri, at natúran skal verða varðveitt fyri okkara eftirkomarum. Runt heimin eru flestu raknað við, og øll meta at týdningarmikið er, at okkurt verður gjørt beinanvegin. Eg hugsi eisini, at politikarar síggja at nakrar atkvøður eru at vinna í hesum.

Men vit vita, at langt er eftir á mál, tí Harrin gav okkum ikki hesa vøkru verð í teirri meining, at hon skuldi oyðast við kríggi, óndskapi ella dálking.

Tað gleðir meg at síggja, hvussu vøkur og vælhildin tey eldru húsini niðri á Reyni og Bakkahellu eru vorðin, eftir at tey eru umvæld. Men vandi er altíð í vælferð. "Elisabeth Minde", ið kendi havnamaðurin Jakku Danielsen bygdi í 1938, sum var eitt satt prýði í mong ár, men sum sær út, sum hon ongan góðan eigur. Og sama er við hjallinum, sum stendur við E. M., sum Christian Didriksen átti í sínu tíð. Hetta er eitt vónbrot at síggja. Hetta skuldi kommunan gjørt nakað við, um eigararnir ikki kunnu finna útav tí.

Eg vil bert nevna eitt dømi afturat, av fleiri. Húsini í Bringsnagøtu, "Í Fjósi", har krambúðin hjá Villa Simonsen lá, seinni Magnus Bærentsen, og har Brugsan av fyrstan tíð sá dagsins ljós, eftir kríggið. Og í hinum endanum av húsinum, nærri Skansastovu, eitt skraddarapar (úr Nólsoy?). Í hinum endanum hevði Fía í Smiðjustovu handil við toy. Húsini "í Fjósi" blivu flutt, helst áðrenn 1938, niðan á Gripsveg, har Kamilla í Fjósi og Hans búgva í teimum.

Eg fari at spyrja Kommununa og tey ella tann, ið hava ábyrgdina av býnum, og hvørjum standi hann er í, um tit vilja kennast við hetta? Hetta hevur jú sæð soleiðis út í mong ár og er ikki nøkur vøkur sjón fyri ferðafólk.

Eg vil eisini í hesum sambandi, nú umhvørvi er í hásæti, heita á Tvøroyrar Kommunu, um tað ikki hevði verið eitt gott hugskot, um at tað bleiv ruddað í Trongisvági, ávegis til Hvalba. Hetta er als ikki nakað prýði fyri ferðafólk heldur.